Bilar

Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo

Porsche Panamera er ein tann mest økonomiski bilur í sínum klassa

PANAMERA - ØKONOMISKUR DIESEL

Við at koyra 1.200 kilometrar upp á ein 80 litur tanga er tann nýggi Porsche Panamera diesel ein tann mest økonomiski bilur í sínum klassa.

Porsche Panamera diesel er ein stórur sportligur luksusbilur við 3,0 litra V6-motori við 250 hk, 8-trins Tiptronic girkassa og koyrir frá 0 til 100 km/t upp á 6,8 sekund. Toppferðin er 242 km/t. Í dieselútgávuni fæst Panamera einans sum bakhjólsdrivin.

Toyota toppar í AutoIndex 2011

Toyota er aftur í ár tað bilmerki, sum danskir bileigarar eru best nøgdir við, vísir tann stóra AutoIndex-kanningin hjá FDM.

Við vurderingum frá 37.221 bileigarum er AutoIndex størsta test av bilmerkjum á danska marknaðinum, har bileigarin í kanningini sigur sína meining um verkstaðið, forhandlaran og sítt nøgdsemi við bilin.

Høsdagin kl. 16.10

Í sendingini er ein samrøða við danska rasarakoyraran Jason Watt, sum vitjaði í Føroyum í sambandi við at Handverkarabúðin hjá Bygma Balslev læt upp. Jason Watt fortelur um sítt lív sum rasarakoyrari og um lagnudagin í 1999, tá hann datt á motorsúkklu og breyt ryggin. Eisini er ein samrøða við Marner við Skipá frá Føroya Oljusølu, sum umboðar Pennzoil í Føroyum.

Marner við Skipá

Jason Watt

Vinnu- & bílradíó á Rás 2